Fra:	Hákun Djurhuus
Til:	Pól E. Egholm; Umhvørvismálaráðið; Kristvør H. Poulsen
Cc:	SEV
Emne:	SV: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita).
Dato:	19. februar 2024 16:11:09
Vedhæftede filer:	image002.png
Følsomhed:	Privat

Til Umhvørvismálaráðið.

Við hesum verður framsent hoyringssvar frá Sev til uppskot um broytingar í elveitingarlógini.

Sev tekur undir við, at elorkuøkið í Føroyum verður endurskoðað og dagført.

Kommunufelagið og Sev gjørdu Umhvørvismálaráðnum vart við, at uppskotið:

- *Ikki var í samsvar við semjuna millum Kommunufelagið, Sev og Umhvørvismálaráðið frá 22. mars 2022,*
- *Ikki var í samsvar við frágreiðingina frá 1. desember 2023, ið arbeiðsbólkurin gjørdi, vísandi til omanfyri nevnda semjuskjal,*
- *Ikki var nóg greitt og ikki í nóg stóran mun tók hædd fyri týðandi viðurskiftum, sum eitt nú tí solidariska grundarlagnum og eini skipaðari útbyggingartilgongd.*

Farið varð inn í eina tilgongd millum øðrumegin Kommunufelagið og Sev og hinumegin Umhvørvismálaráðið. Henda tilgongdin bendir á, at tað ber til at koma til eitt úrslit, sum Kommunufelagið og Sev kunnu taka undir við. Hetta hoyringssvarið ber brá av, at farið er undir nevndu tilgongd og av, at Sev væntar, at tilgongdin heldur fram í víðari arbeiðinum. Hoyringssvarið er tí ikki so nágreiniligt, sum tað annars kundi verið, men verða niðanfyri í stuttum umrødd nøkur av týdningarmiklu viðurskiftunum.

Sæð við Sev eygum verður (væntaða) úrslitið ikki optimalt, men úrslit av omanfyri nevndu upprunaligu semju frá 22. mars 2022 og eini eftirfyljandi tilgongd. Eitt nú heldur Sev ikki, at treytirnar um bannan av persónssamanfalli í nevnd og stjórn í tí sundurbýtta virkseminum fyri kappingarútsett virksemi eru skilagóðar og vilja slíkar reglur ikki stuðla upp undir ein góðan virkisrakstur hjá Sev. Hinvegin vil virksemið hjá Sev sum eigari og kervisábyrgdari av elnetinum, herundir skipanarberandi eindum við tilhoyrandi framleiðslu v.m., væntandi verða nágreinað í lógaruppskotinum og tilhoyrandi viðmerkingunum í mun til verandi lóg.

Í lógaruppskotinum verður víst til uppgávuna hjá Sev sum eigari og kervisábyrgdari av elnetinum. Í hesum sambandi er umráðandi at tilskila, at kervisábyrgdin m.a. fevnir um balansuábyrgdina, systemoperatørleiklutin og veitan av skipanarberandi tænastum. Annað virksemi í hesum sambandi fevnir m.a. um virksemið hjá Sev í samband við keyp og sølu av el. Elnetið fevnir um netið frá framleiðslu til málaran hjá endabrúkaranum, herundir flutningsnetið og býtisnetið. Harumframt eru allar skipanarberandi eindir við tilhoyrandi framleiðslu, sum til dømis termisk verk, vatnverk og møgulig pumpuverk, eins og royndar-, granskingar- og menningarverkætlanir við tilhoyrandi framleiðslu, eisini partur av elnetinum. Galdandi áseting um, at netvirksemið fíggjarliga skal hvíla í sær sjálvum eigur at

verða broytt soleiðis, at samlaða (ikki "kappingarútsetta virksemi") hjá Sev fíggjarliga skal hvíla í sær sjálvum.

Sev fatar støðuna soleiðis, at í mun til verandi skipan er "kappingarútsett virksemi" stutt sagt at skilja sum framleiðsluútboð (lýst verður alment eftir umsóknum eftir framleiðsluloyvum, sambært § 5, stk. 2), umframt virksemi har veittar verða aðrar tænastur saman við sølu av el.

Langtíðar útboðs- og útbyggingarætlan eigur áhaldandi at verða gjørd og fylgd. Útboð eiga at verða framd í samsvari við langtíðar útboðs- og útbyggingarætlanina. Skipanarberandi eindirnar eiga ikki at verða bodnar út.

Viðvíkjandi kapittul 3 b um keyp og sølu av el skilir Sev hetta soleiðis, at Sev skal keypa og selja alt el, ið verður flutt á elnetinum. Sev fer at áseta skiftandi prísir í mun til, hvussu nógv grøn elframleiðsla er tøk á elnetinum. Sev kann framhaldandi selja el beinleiðis til kundarnar, meðan sølufeløg kunnu keypa el frá Sev at selja víðari.

Tað fer at taka tíð hjá Sev at tillaga prísskipanina við mannagongdum og bygnaðin v.m. samsvarandi semjuskjalinum og broyttu ásetingunum í lógaruppskotinum. Harumframt fer tað at taka tíð hjá Sev at fyrireika seg til nýggju ásetingarnar um keyp og sølu av el. Tí er eisini umráðandi, at hædd verður tikið fyri hesum í sambandi við ígildiskomuna av viðkomandi lógarreglum.

At enda skal nevnast, at Sev hevur ikki gjørt viðmerkingar til tann partin av lógaruppskotinum, ið snýr seg um fjarhita. Gingið verður út frá, at P/F Fjarhitafelagið ger hetta.

Blíðar heilsanir
Hákun Djurhuus
Stjóri

Landavegur 92 Postsmoga 319
110 Tórshavn +298346800
hd@sev.fo | www.sev.fo